reportasjurøð | Lívið á Landssjúkrahúsinum



*Jákup og Theodor Høgagarð, narkosulækni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

ávarar Jákup hana.

– Noy, noy! Eg havi ongantíð verið nakar Tarzan, skemtar hon afturímóti.

Niðri í viðrakningini er vírikurin aftur vaknaður við. Jákup ráðgevur, samstundis sum hann liggur á knæ og kannar:

– Ver strangur við teg sjálvan. Hav beinið uppeftir; eisini fyri at sleppa undan bruna. Fyri einaferð skuld er tað tú, sum liggur á sofuni við fjarstýringini, og konan sum rennur ...

Jákup vitjar aftur óstbeinskonuna; hesa ferð saman við starvsfelaganum, Gudmundi Harri Guðmundssyni. Teir vilja vita, nær ið hon vil hava teir at orðna hitt óstbeinið. Eingin ivi er um, at tað skal vera sum skjótast.

– Eg veit, hvat ið tað er at hava ilt, staðfestir tolna konan, sum liggur í seingini og leggur dent á, at hon bara hevur gott at bera øllum á Landssjúkrahúsinum.

– Eg vil fram um alt bara blíva arbeiðsfør aftur. Heldur tú ikki, at eg verið tað, spyr hon og hyggur gáin inn í eyguni á Jákupi, sum játtar í stundini.

Í dagskurðrúminum á G1 er russarin raknaður við í øllum góðum. Har skrivar Jákup seinastu váttanina í dag, meðan vit síggja í reyvina á Rituni, sum fer vaggandi út við nólsoyingum, ið longu hava fingið frí.

Og so lukkast Jákup at ringja til Knud Steinø og ráðgeva honum um, at ein gamal og tvørligur suðuroyarfrakturur helst krevur eina Sarmiento-tilbinding. Dagur er farin at halla, tá ið Gudmundur Harri og hann hittast í starvsfólkarúminum áðrenn stovugongd á G4.

– Føroyingar hava eitt nógv betri heilsuverk, enn teir geva sær far um, heldur Jákup, tá ið starvsfelagarnir hava sett seg niður og kastað dagin av sær.

– Á Ullevål gingu tað vikur, áðrenn vit, fremstu serfrøðingarnir, møttu trupulleikanum, vit skuldu loysa. Her er sera stutt millum úthurðina og serlæknan, staðfestir hann.

– Ja, og eg havi ongantíð arbeitt á eini skurðgongd, sum virkar so væl, sum henda. Starvsfólkini eru ógvuliga áhugað í at fáa tingini at glíða. Øll arbeiða væl saman, vil Gudmundur Harri vera við.

– Tað er blivið nógv betri síðan í hálvfemsunum. Tá blivu svørðini brýnd í hvørjari stovu, og blóðið fleyt í gangunum, gleppur burtur úr Jákupi, sum gníggjar eyguni og geispar. Einki er at ivast í, at akslaskurðfrøðin í Føroyum fer at liggja á herðunum á honum komandi árini. Men akslar eru valla øll orsøkin til, at hann í næstum formliga fer at flyta heim við børnunum og konuni, sum eisini er úr Havn. Tað er helst bara laksaíelvið, ið ger ein vørr. Teimum vaksnu leingist heim til upprunastaðin.

Og so er tað tað, at ongar ommur og eingir abbar eru í Oslo.

## Næstu ferð

Við vaktarskiftið klokkan ellivu góvu kvøldvaktirnar rapport um sjúklingarnar. Dentur varð lagdur á teir tyngstu. Maðurin við lungnakrabba hevur opið atgongumerki til deildina. Hann er farin heim at halda vikuskifti. Livir ein dag í senn. Tað stundar til deyða. Ein annar maður, ið hevur krabbamein í baktarminum, berjist manniliga inni í kanningarrúminum. Hann hevur forstoppilsi og fær dropp við heilivági, ið skal fremja opning. Hann er fullur av fæsis, siga tey. Pínan hevði verið ótolandi, fekk hann ikki morfin alla tíðina. Krabbasjúklingurin á stovu 1 hevur tað hinvegin betri. Hann hevur fingið kroyst eitt sindur av breyði og eina kalda bjór niðurum. Annars er hann ússaligur og etur næstan einki. Allir hesir tríggir sjúklingarnir hoyra til røktarbólk 4, sum er nógv tann tyngsti.

**Í fimtu greinini í røðini um Lívið á Landssjúkrahúsinum vitjar Høgni Mohr á seingjardeildini B7.**
**Les reportasjuna í næsta Vikuskifti.**

Sosialurin